

# Óli P framman fyri sína tíð

*Landsins hægstu menn: Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Edmund Joensen, løgtingsformaður og karikaturteknarin á Sosialinum, sum umboðar 3,5. statsvaldið sambært Edmund Joensen…*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

BÓKAÚTGÁVA

Fitt av fólki hevði leitað sær oman í Miðlahúsið í Vágsbotni til bókaframløgu nú um dagarnar. 17. útgávan av SKEMT við tekningum hjá Òla P varð løgd fram. Bókin, sum eisini er ein jubileumsbók, nú teknarin verður 70 ár í januar, rúmar 160 tekningum, sum hava staðið á baksíðuni í Sosialinum hetta farna árið. Eisini eru fleiri føðingardagskvøður til listarmannin.

Hátíðarligu løtuna í Miðlahúsinum tóku bæði tingformaður og løgmaður orðið. Teir hava sum vera man verið offur hjá Óla P í mong ár og serstakliga sum løgmenn.

Edmund Joensen helt fyri, at Óli P hevur ríkað tað politiska lívið í Føroyum við sínum beinraknu tekningum. Uttan hann hevði verið fátæksligt. Hann hevur verið ein partur av valdsbýtinum í samfelagnum. - Vit hava tað lóggevandi valdið við 32 tingmonnum. Vit hava tað útinnandi valdið við sjey landsstýrismonnum og løgmanni, vit hava ríkisumboðsmannin, vit hava fjølmiðlarnar og síðani hava vit Óla. Vit plaga at siga, at valdið er tríbýtt og síðani kemur pressan sum tað fjórða statsvaldið. Eg vil siga, at Óli sum karrikaturteknari kemur áðrenn 4. statsvaldið. Hann er at finna onkunstaðni millum dømandi valdið og pressuna.

Tingformaðurin vísti á, at meðan tann luftborna og skrivandi pressan brúka eina rúgvu av tilfari at greiða frá einum máli, so kemur Óli sum ketta burtur úr høvdatrog. Hann kemur ikki seint burtur úr, men tíðliga. Hann sær støðuna á tí politiska pallinum langt áðrenn nakar annar og sker hana út í papp. Og hann sær langt frammanundan, hvat úrslitið verður á einum máli.

Edmund Joensen, sum umframt at vera politikari eisini er virkin bridgespælari helt fyri, at sum politikari brúkar tú oftani royndirnar frá kortspælinum og leggur kabalir og hugsar fleiri leikir fram. Tá Óli teknaði og var í essinum flutti hann bæði 2. og 3. leik, langt áðrenn man sjálvur megnaði tað.

Tingformaðurin takkaði teknaranum fyri tað, sum hann hevur verið fyri politikararnar og hann skýrdi samtíðis Óla P fyri at vera ein av Føroya bestu listarmonnum.

Eisini løgmaður hevði góð orð at bera Óla P. -Kritikkurin hevur oftani verið ógvuliga hvassur og presisur. Tekningarnar hava ríkað okkum í gerandisdegnum. Tað, sum ger meg sannførdan um, at Óli er ein framúr góður karrikaturteknari, er, at hann so framúr væl megnar at tekna ein persón aftanífrá. Tú sær ikki andlitið men veit kortini, hvør persónurin er.



*Óli P., karikaturteknari og Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, tá 17. SKEMT bókin kom, næstseinasta fríggjadag*

Løgmaður helt listina hjá Óla fevna um so nógv. Hann metti viðmerkingarnar og orðini til tekningarnar at vera veruliga kryddaríið. Hetta at Óli dugur so ótrúliga væl at finna tey røttu orðini og orðspælið til sínar tekningar, enn ein týðandi partur av listarkynstrinum hjá teknaranum.

Eisini Frits Johannesen, listarmaður hevði lukkuynski til Óla P. - Tingformaðurin nevndi, at Óli var framman fyri politikarar. Og tað er so púra rætt. Hann er oftani framman fyri politiska rákið. Listin og fólk, sum fáast við list eru framman fyri samfelagið vit liva í, uttan at vit vita av tí.

Fjórði røðan undir bókaframløguni var Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum eisini hevur skrivað høvuðsgreinina í bókini. Vit prenta røðu hansara og annars orðini, sum fyrrverandi bankastjórin Jørn Astrup Hansen, hevur skrivað í Skemt 05.